


*Ikki minst hava betraðu fíggingarmøguleikarnir á sethúsamarknaðinum havt positiva ávirkan á landsbúskapin sum heild*

# Vøkur búskaparútlit

**Búskaparlig framgongd, framhaldandi yvirskot á gjaldsjavnanum, nærum javnvág í landskassaroknskapinum og fallandi arbeiðsloysi. Tað eru nakrar av yvirskriftinum, sum eyðkenna hálvársfrágreiðinga, sum danski Tjóðbankin hevur latið gjørt um føroyska búskapin.**

BÚSKAPARFRÁGREIÐING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í frágreiðingini staðfestir Tjóðbankin, at talan nú aftur er um framgongd í føroyska búskapinum, sum annars hevur staðið mest sum í stað í nøkur ár. Serstakliga sæst framgongdin aftur í vaksandi lønarútgjaldingum, og hartil hava hækkandi fiskaprísir saman við nýggju fíggingarmøguleikunum innan sethúsamarknaðin sett enn meira ferð á búskaparligu gongdina.

### Reallønarvøkstur

Bara hetta seinasta hálva árið hevur talan soleiðis verið um eina munandi hægri realløn hjá føroysku løntakarunum. Vøksturin í lønarútgjaldingunum hevur hesa tíðina verið 6%, og tá prístalið í sama tíðarskeiði er økt 2%, er keypiorkan hjá føroyinginum voksin munandi.

Vøksturin í reallønini er tó lítið at rokna móti øktu keypiorkuni, sum nýggju fíggingarmøguleikarnir hava givið. At hetta eisini hevur økt um trýstið á bústaðarprísirnar metir Tjóðbankin í sjálvum sær ikki vera nakran ovurstóran vanda. Virðið á sethúsum er í dag lutfalsliga eins stórt í mun til inntøkuna hjá fólki, sum tað var undan kreppuárunum. Men longri avdráttartíð og eitt munandi lægri rentustøði bera tó við sær, at trýstið á gjaldsførleikan hjá húsaeigarum ikki er eins stórt.

### Góður landsbúskapur

Og endaliga stafðestir Tjóðbankin eisini, at landsbúskapurin hevur tað gott. Hóast fíggjarlógin fyri 2006 eisini gevur eitt hall á einar 200 mió kr., eru útlit fyri, at úrslitið verður betri enn sum so. Serstakliga hava øktir skattir og avgjøld muna væl í kassanum í Albert Hall, og tí verður mett, at talan verður nærum um javnvág í landskassaroknskapinum. Og tá er ikki-ætlaða vinningsbýtið úr Føroya Banka ikki roknað við.

At enda verður staðfest, at útlit eru fyri, at landshúsarhaldið eisini hevur postivan roknskap komandi árini. Ikki minst, tí alivinnan spakuliga er um at koma fyri seg, samstundis sum byggivinnan enn hevur úr at gera. Eisini standa fleiri stórar almennar útbyggingar fyri framman, og gera hesar sítt til, at byggivinnan neyvan upplivir nakra stagnatión í sínum virksemi.

Vandi er tó í allari vælferð, og endar frágreiðingin við at ávara móti niðurgongd í fiskiskapi, eins og tað ikki kann roknast við, at fiskaprísirnir halda sær á verandi høga støði í allar ævir, verður sagt.

# Lurta – men ikki eftir øllum

**Politikkarar lurta altíð. Spurningurin er kanska heldur, hvørjum teir lurta eftir, og hvussu lang- og stutttíðar áhugamálini verða vigað móti hvørjum øðrum, heldur Sigurd Poulsen, landskbankastjóri**

BÚSKAPARFRÁGREIÐING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann er ikki ósamdur í metingini hjá danska Tjóðbankanum, har tað verður staðfest, at føroyski búskapurin í løtuni hevur tað gott.

– Nú havi eg ikki nærlisið frágreiðingina, men sum heild haldi eg, at tað hevur gingist væl seinnu árini. Einsta staðni eru fløskuhálsar tó at síggja við vantandi arbeiðsmegi, men sum heild er talan ikki um nakran ovurstóran trupulleika.

– Men tað kundi kanska verið ynskiligt, at vit megnaðu at fáa fleiri av teimum, sum arbeiða uttan fyri landoddarnar aftur til Føroya. Í hesum førinum eru tað tó vanliga útboð og eftirspurningur, sum stýra marknaðinum, og vit fáa so at síggja, hvussu hesar fara at ávirka tann spurningin.

Sum nevnt aðrastaðni á síðuni, so finast Tjóðbankin tó at føroyska fiskivinnupolitikkinum, sum verður skírdur stuttskygdur. Eitt skoðsmál, ið Sigurd Poulsen ikki er heilt ósamdur í, tó at hann ikki vil gera nakra greiða niðurstøðu. Hvørki í aktuella spurninginum, ella í politiska kjakinum, sum hevur stungið seg upp í kjalarvørrinum á stovnsmetingunum og tilráðingunum annars frá Fiskirannsóknarstovuni.

– Tað er eingin sum helst ivi um, at politikkarar lurta eftir tí, sum sagt verður. Spurningurin er tó samstundis, hvørt lurta verður meira eftir langtíðar tilmælunum ella eftir bráðfeingis trupulleikunum, sum eru í ýmsu pørtunum av vinnuni.

– Sum búskaparfrøðingur vil tilmælið sjálvandi altíð vera at fygja tí, sum í longdini gevur besta avkastið til samfelagið. Hinvegin er tað trupult hjá politikkarum at avvísa akuttar trupulleikar, og tí er tað støðugt so, at ein javnvág skal finnast millum hesi, heldur Sigurd Poulsen.

## Stuttskygdur politikkur og tilfeingisgjald

**Hóast bjørt búskaparútlit, so er talan ikki um rósandi orð, tá føroyskur fiskivinnupolitikkur verður umrøddur í búskaparfrágreiðingini hjá danska Tjóðbankanum**

BÚSKAPARFRÁGREIÐING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri tað nógva er talan mest sum um einvíst positiv búskapartekin í búskaparfrágreiðingini hjá danska Tjóðbankanum.

Men tá skrivað verður um røkt av føroysku fiskastovunum, eru orðini tó eins lovandi.

Eitt nú verður funnist at løgtinginum, tí hesir reka ein stuttskygdan fiskivinnupolitikk, har bráðfeingis áhugamálini hjá vinnuni verða tikin framum langtíðarmálið at byggja upp toska- og hýsustovnin. Ein gongd, sum í longdini hevur eitt verri avkast við sær, enn ein miðvís stovnsrøkt hevði havt tað.

Niðurgongdin í serliga toskafiskiskapinum verður tó uppvigað av vøkstri í bæði prísi og nøgd í upsafiskiskapinum, eins og fiskiskapur eftir øðrum fiskasløgum er øktur. Eitt nú er fiskiskapurin eftir havtasku tvífaldaður tey bæði seinnu árini, soleiðis at hesin nú er 10% av inntøkugrundarlagnum í fiskivinnuni.

### Tilfeingisgjaldið

Hartil nertir frágreiðingin eisini við spurningin um tilfeingisgjald í fiskivinnuni. Ikki minst verður sagt, at talan er um yvirnormalan vinning í pelagisku vinnuni, meðan hesin ikki er eins stórur í øðrum pørtum av fiskivinnuni. Hetta tí rentan her í nógv størri mun verður býtt í veiðiliðinum, har veiðiloyvini eru fleiri, enn fíggjarliga gongdin í sjálvum sær borgar fyri. Ein politikkur, sum hevur havt við sær, at effektiviteturin í hesum parti av vinnuni er væl lægri, enn hann annars vildi verið, verður sagt í frágreiðingi.